
# Jón í London: Pál er ísakaldur




**OL Um vikuskiftið komu Pál Joensen og Jón Bjarnason til OL býin í London. Pál skal í hylin á fyrsta sinni 28. juni og Jón Bjarnason letur væl at fyrireikingunum**

Tróndur Arge

Pál Joensen og Jón Bjarnason eru nú farnir undir seinastu fyrireikingarnar til Olympisku leikirnar. Teir komu til OL býin sunnudagin saman við restini av danska OL-svimjuhópinum, sum hevur verið á venjingarlegu í Rijeka í Kroatia.

Pál Joensen og Jón Bjarnason skulu búgva í OL býnum, sum skal húsa áleið 17.000 øðrum fólkum, sum á ein ella annan hátt eru partur av OL. Trygdin er eisini í hásæti.

– Tað er øgiliga stórtsligi. Tað eru nógv trygdarfólk og tað er ringt at koma út og inn úr OL býnum. Tað er sum at vera á flogvøllinum, har alt verður kannað áðrenn tú sleppur víðari. Tú skalt tøma lummar og avlevera taksur og annað, sum so verður skannað. Tað eru heldur ikki hvør sum helst, ið kannar teg. Tað eru herðmenn, sum eru komnir heim úr Afganistan, ið ætlaðu sær heim til familjuna, men nú mugu standa á vakt, forklárar Jón Bjarnason, venjari hjá Páli.

Tað at trygdin er í hásæti kann fáa eina ávirkan á fyrireikingarnar. Tað tekur tíð at koma úr OL býnum og tí er planlegging lykilin.

– Tað kann koma at fáa eina ávirkan um vit eitt nú skulu tosa við miðlarnar, tí so verða vit noyddir at ganga allan vegin út, tí tú sleppur ikki at koyra gjøgnum trygdarøkini. Tí verður tað neyðugt at planleggja so at vit kunnu fáa fleiri flugur við eitt smekk, og práta við fleiri miðlar í senn, sigur Jón Bjarnason




*Pál Joensen venur í løtuni í eini fyribils svimjihøll við 30 langbana geilum, ið er sett upp til endamálið.*

**Hann er so ísakaldur, at hann kom ov seint til bussin í morgun**

JÓN BJARNASON UM PÁL

Pál Joensen venur í løtuni í eini fyribils svimjihøll við 30 langbana geilum, ið er sett upp til endamálið.

– Fyrireikingarnar hava gingið ógvuliga gott. Tær hava verið uttan nakrar stórvegis trupulleikar. Vit venja saman við eitt nú USA og Avstralia, eitt sindur avsíðis frá hinum, men umstøðurnar eru frálíkar, sigur Jón Bjarnason.

### Avslappaðir menn í London

Í fýra ár hava Pál Joensen og Jón Bjarnason miðvíst vant fram móti OL. Tí kundi hugsast at tað stóð nógv á Páli nú, men so er ikki.

– Tá vit byrjaði at venja neyvt móti OL vandi Pál nógv og var troyttur. Hann vandi millum annað styrki venjing tvær ferðir um dagin. Tá var hann eitt sindur nervøsur, men vit hava tosað um tingini og hann er ísakaldur nú. Hann er so ísakaldur, at hann kom forseint til bussin í morgun, sigur Jón skemtandi og leggur aftuat at tað er tekin um at Pál er púra róligur nú OL leikirnir nærkast.

Eisini Jón sjálvur er avslappaður rundan um støðuna, nú tað stundar til fyrstu svimjingina, sum verður 28. juni.

– Løgið nokk, so eri eg sera avslappaður, men eg bleiv eitt sindur spentur tá tað byrjaði at ganga væl á venjingarleguni í Kroatia. Eg havi góðtikið at hetta er krúnan á verkinum og eg verið sjálvandi spentur tá eg skal standa á síðuni meðan Pál svimur, sigur Jón Bjarnason.

### Bjarnason ikki selt bjarnaskinnið

Tá samrøðan fellur inn á vónirnar hjá Páli vil Jón Bjarnason ikki selja skinnið fyrr enn bjørnin er skotin, men hann hevur góðar vónir.

– Eg fari ikki at selja skinnið áðrenn bjørnin er skotin, men tað sær lovandi út. Hann hevur lætt við at svimja skjótt og vit fara at royna at koma í 400 metra frí finaluna. Hetta er ikki hannsara besta grein, men vit trúgva upp á at hann kann klára tað, sigur Jón Bjarnason.

Pál Joensen hevur gjørt greitt, at tað er í 1.500 metra frí svimjingini, at hann ætlar at gera bart. Tí verður 400 metra frí svimjingin, sum er tann fyrsta, mett sum ein upphitini. Tó vónar Jón at Pál kann koma í finaluna alíkavæl.

Jón Bjarnason hevur ikki hugt so nær at mótstøðuni og roynur at halda síni egnu kort tætt at kroppinum.

– Eg havi ikki hugt nærri at mótstøðuni enn at vit vita hvat hinir koma við, og hvat teir kunnu. Sjálvir royna vit at goyma okkum eitt sindur og halda kortinum tætt at kroppinum. Men vit kunnu ikki stýra hvat hinir kunnu, so vit halda ikki eyga við teimum meir enn tað, sigur Jón Bjarnason at enda.

Fyrsta svimjingin hjá Páli verður 28. Juni, tá verður innleiðandi umfarið í 400 metrar frí.

*trondur@sosialurin.fo*

**Løgið nokk, so eri eg sera avslappaður**

JÓN BJARNASON

## SKRÁIN HJÁ PÁLI JOENSEN

**Leygardagin, 28. juli:**
Kl. 10.47: 400 m frí, innleiðandi
Kl. 19.49: 400 m frí, finala
(treytað av, at hann svimur seg víðari)

**Týsdagin, 31. juli:**
Kl. 11.17: 4x200 m frí, innleiðandi
Kl. 20.47: 4x200 m frí, finala
(treytað av, at hann svimur seg víðari)

**Fríggjdagin, 3. august:**
Kl. 10.23: 1500 m frí, innleiðandi

**Leygardagin, 4. august:**
Kl. 19.36: 1500 mr frí, finala
(treytað av, at hann svimur seg víðari)

## Veddingarfyritøkurnar trúgva ikki upp á heiðursmerki til Pál

Skulu vit trúgva veddingarfyritøkunum Bet365, Sportingbet og Bwin, so vinnur Pál Joensen ikki heiðursmerki til OL leikirnar í London.

Bet365 hevur Sun Yang sum stórfavoritt til odds 1.20. Pál Joensen er styrkismettur sum nummar seks saman við Andrew Gemell og Gregorio Paltrinieri til odds 26. Tað vil siga at tú fær pengarnar 26 ferðir aftur um Pál vinnur. Frammanfyri teir eru Taehwan Park odds 7, Ryan Cochrane odds 13, Gergo Kis odds 19 og Oussama Mellouli odds 21.

Sportingbet hevur eisini Sun Yang sum stórfavoritt til odds 1.22. Styrkismetingin hjá teimum er álei tann sama, men oddsini upp á ein sigur til Pál Joensen er upp á heili 41.

Bwin hevur Pál Joensen styrkismettan sum nummar fimm saman við Gergo kis Daniel Fogg til odds 21. Eisini her er Sun Yang stórfavorittur til odds 1.15.